





# Yndifitness við Sundsvegin




*Venjingarmiðstøðin hjá Yndifitness við Sundsvegin*

Føroya mest modernaða venjingarmiðstøð, Yndifitness, byrjar nýggja árið í einum megastórarum sentrið við Sundsvegin.

Yndifitness, sum heldur til yviri við Strond í Havn, flytur í nýggj hølir við Sundsvegin eftir nýggjár. Talan er um bygningin, har sum handilin Inn og fotografarnir Per á Hædd og Finnur Justinussen halda til.

Jákup Jacobsen, stjóri í Yndifitness, sigur, at nýggju hølini eru tilsamans 1.100 fermetrar og venjingarmiðstøðin Yndifitness fær nú nógv fleiri møguleikar at bjóða nýggjar tænastur. Yndifitness verður nú ein venjingarmiðstøð fyri alla familjuna. Skipað verður soleiðis fyri at børn og foreldur kunnu venja samstundis men á hvør sínum støði og við hvør sínum instruktørum.

Yndifitness kemur at skipa fyri ymiskum skeiðum við útlendskum instruktørum. Skeiðini verða bæði fyri instruktørarnar og fyri onnur áhugað.

Tilsamans 21 fólk hava tikið prógv sum fitnessinstruktørar og saman við mær verða vit nú 22 instruktørar, sum eru knýttir at venjingarmiðstøðini, sigur Jákup Jacobsen, stjóri í Yndifitness og leggur afturat, at Yndifitness kemur at liggja sera væl fyri við ítróttarøkið í høvuðsstaðnum við Tórsbreyt og Svimjihøllini sum grannar.

Í sambandi við at nýggja venjingarmiðstøðin verður tikin í nýtslu, verður móttøka við Sundsvegin sunnudagin 2. januar frá kl. 14-18. Yndifitness letur alment upp við Sundsvegin mánamorgunin 3. januar kl. 6.00.